# Stórarbeiði í Hesti

**Í gjár fór Heðin Mortensen við einum ferðalagið út í Hest. Vitjanin varð gjørd í samband við, at har er asfalterað, gjørd nýggj kloakkskipan, gøtuljós og annað. Arbeiði hevur kostað Tórshavnar Kommunu 4,5 milliónir krónur**

ÚTOYGGJ
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Ferðalagið við Heðini Mortensen, Marin Katrinu Frýdal og fjølmiðlunum varð avheintað á gomlurætt av einum skjóttgangandi báti. Veðrið var av tí allar besta. Hestoyggin er ein sera vøkur oyggj, og hon var avbera vøkur í góðveðrinum í gjár.

Tá ið vit løgdu at við gamla bátahyl, vóru nøkur fólk komin oman at taka ímóti okkum. Á keiøkinum stóðu nógvar stórar maskinur og akfør.

Teir, sum høvdu staðið fyri arbeiðinum, greiddu okkum frá, hvat er gjørt. Á keiøkinum er ein nýggj kloakkskipan gjørd. Allar kloakkirnar í bygdini eru samlaðar og renna oman til eitt reinsiverk á keiini. Tað var týdningarmikið at hava kloakkirnar samlaðar sentralt í bygdini.

Reinsiverkið liggur undir jørðini. Tá ið alt arbeiði er gjørt undir jørðini, kann tað verða torført at síggja, hvussu stórt arbeiði hevur ligið í tí. Men bæði borgarstjórin og fyristøðumenninir vístu á, at tað var eitt sera umfatandi arbeiði við kloakkskipanini.

### Vegirnir asfalteraðir

Sjáldan hava so nógvar stórar maskinur verið á Hesti. Arbeiðsmenninir hava asfalterað vegirnar úti í Hesti. Asfalteringin var ikki heilt liðug í gjár, tá ið Sosialurin var á staðnum, men tað lýður væl. Asfaltið var ein ikki heilt storknað, og tað klistraði undir skónum, tá ið vit gingu á asfaltinum.

Tað er sera gott fyri hestmenn at fáa ordiligar vegir. Tá ið hoyggingin byrjar, verður nógv lættari at koyra við traktorunum.

Gøtuljósini eru skift út, og fleiri nýggj eru komin upp. Eisini er ein nýggjur vatnbrunnur gjørdur oman fyri bygdina, og ætlanin er at gera eitt vatnreinsiverk einaferð í framtíðini. Arbeiðið tilsamans hevur kostað 4,5 milliónir krónur. Hendan upphæddin hevði verið ógjørlig hjá hestmonnum at rinda, um teir ikki komu uppí Tórshavnar Kommunu.

Eitt lítið SEV-hús er komið upp og telefonleidningar eru lagdir, men tað er ikki kommunan sum hevur rindað tað.

- Vit eru fegnir um, at SEV og Føroya Tele eisini vilja gera íløgur til at betra um trivnaðin úti í Hesti, segði Heðin Mortensen.

Hestfólk tyktust at vera sera væl nøgd við arbeiðið, og Heðin Mortensen, Marin Katrina Frýdal, arbeiðsfólkini og fjølmiðlarnir vóru vinarliga heilsaðið allastaðni. Sum heild var huglagið sera gott úti á Hesti í gjár.

# Altíð búð í Hesti

*74 ára gamli Hans Colbjørnsen hevur búð í Hesti alt lívið. Hann siglir úti við sínum egna báti. Her er Hans í bátinum hjá sær*



**74 ára gamli Hans Colbjørnsen hevur búð í Hesti alt sítt lív. Hann heldur, at tað er gott, at kommunan ger íløgur á oynni**

SAMRØÐA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Hans Colbjørnsen er yngstur av fýra systkjum. Allar systrarnar eru fluttar av oynni, men Hans býr enn í húsunum, sum hann hevur búð í frá barnsbeini. Hann bjóðar mær inn til drekkamunn og eitt prát.

Nógv er broytt í Hesti síðani Hans var barn. Hann fortelur, at tey plagdu at herma eftir teimum vaksnu, tá ið tey spældu. Um kvøldarnar gjørdist so myrkt, áðrenn el var komið. Men tey sóu kortini at spæla, tí at tey høvdu so von eygu.

- Í dag fara børnini ikki út um kvøldarnar, tí at tey síggja einki í myrkrinum.

### Eingin veit um framtíðina at siga

Væntar tú at fleiri fólk fara at flyta til Hest, nú hesar íløgurnar eru gjørdar?

- Tað kann henda seg. Fólkatalið er bara minkað síðani eg var barn. Tá búðu um 80 fólk her. Nú eru eini 40-50 fólk búsitandi her. Eingin veit um framtíðina at siga, men eg vóni tað besta, sigur Hans.

Hans var 14 ár, tá ið hann fyrstu ferð fór til skips. Hann var burtur í 4 mánaðir, og hann hevði sjóverk allan túrin. Tá ið hann var 17 ár, fekk Hans sín fyrsta bát. Hann átti hann saman við vinmanninum Magnus, og teir sigldu saman í nógv ár. Hans hevur átt sjey bátar tilsamans.

Hann býr í húsunum, sum foreldrini áttu. Tey eru 80 ára gomul. Hann hevur umvælt tey nógv innan.

- Eg trívist væl her. Eg plagi at fara á flot, tá ið okkurt er at fáa. Tá ið eg eri heima, plagi eg at stákast á stykkinum. Annars eri eg eisini ofta á vitjan hjá systrunum, sum búgva á Skála, á Strondum og í Sørvági.

- Tað var nokkso keðiligt, tá ið handilin lat aftur fyri umleið 15 árum síðani. Nú keypir hann inn frá handilinum í Skopun. Hann bíleggur gjøgnum telefon, og so kemur vøran við Teistanum til Hest.

Hans hevur sæð nógv broytast í Hesti, og nú hevur hann eisini fingið túnið asfalterað, nýggj gøtuljós og annað.

- Hetta er deiligt. Vit høvdu als ikki havt ráð til hetta, um Hest Kommuna ikki legði saman við Tórshavnar Kommunu.

Vit fara hvør til sítt. Hans gongur móti sínum heimi har norðuri í bygdini, og eg fari oman móti gomlu kei, har ið tann skjóttgangandi báturin bíðar eftir at sigla okkum yvirum aftur til meginøkið.